




# Royna ørnaleið fjart frá matfuglameingi



TÓRBJØRN JJACOBSEN
Tjóðveldi

Hálva aðru viku fyri jól varpa brellýsingarnar í krambúðagluggunum ein ísakaldan boðskap út á gøtur og stræti. "Droppið Vágar og Sandoy" er eysturoyartingmaður Tjóðveldisins endurgivin fyri at siga. Tó ikki bókstaviliga, men hugsað verður sjálvandi um komandi útbyggingina í Vágum og ætlaða undirsjóvartunnilin til Sandoyar. Alt tað sum krúpa kundi krøkti eftir blekkhúsanum, innan- og uttangarðs. Sjálvt pylsumetaforurin varð endurnýttur fyri túsundu ferð, hesaferð av eini kvinnu, sum eftir øllum at døma ikki líktist á bleytar pylsur. Hin endurgivni verður meira viðgjørdur enn endurgevingin inni í blaðnum. Hvat er tá annað til ráð at taka, enn at lena seg afturá, og øtast um býttiskapin eina løtu. Forsíðan er íkomin av einum fundi, sum varð hildin á Hotel Føroyum, um møguleikan fyri at leggja ein altjóða flogvøll í Føroyum. Tá segði eg púra rætt, at gera vit eina hugsaða roynd, og leggja hesar báðar omanfyrinevndu íløgur saman, so fer tað at tátta í kostnaðinum av einum spildurnýggjum altjóða flogvølli, við øllum teimum fasilitetum sum hartil hoyra. Í uttasta konsekvensi, varð hendan leiðin vald, hevði logiska fylgjan verið hon sum blaðmaðurin er komin til í síni myndbornu yvirskrift. Veruleikin er helst ikki so einfaldur kortini. Og tó.

Hesi bæði málini kunnu heldur ikki samanberast. Als ikki. Tey liggja heilt á hvør sínum viðgerðarstigi. Sandoyartunnilin er ein av hundraðtals samtyktum í politisku skipanini, yngri og eldri, sum onga játtan hevur. Onga fígging hevur, og tí er hon rættiliga óaktuel í valstríðnum fram undir løgtingsvalið. Tí er tað eisini rættiliga tragikomiskt, at menn stilla upp, og leypa flokk av flokki, av ræðslu, ja, eru bebbaræddir fyri einum A4 arki, sum nú liggur hult í einhvørji skuffu úti í Vinnumálaráðnum, millum cigarirnar sum javnaðar- og fólkafloksmenn plaga at roykja saman, táið teir stóru rossahandlarnir verða gjørdir. Táið ein nýggj samgonga verður skipað, verður hetta málið ivaleyst eitt av mongum, sum skulu vigast í raðfestingarætlanini, táið setast skal út í kortið, hvussu tær almennu Føroyar skulu reka ein so skilagóðan íløgupolitikk sum gjørligt. Áneyðirnar eru stórar á fleiri økjum, tí verður telvingin rættiliga avgerðandi fyri, hvussu skjótt hetta landið mennir seg úr ússaligum hjálandahøpi í nationalan og búskaparligan sjálvburðarskap. Tí er tað heldur ikki líkamikið hvønn flokk ið veljararnir seta inn á ting fyri at stjórna gongdini komandi 4 árini.

Flogvallaviðurskiftini. Føroyingar hava ongantíð tikið avgerð um sítt loftvegis samband við umheimin. Bretar valdu at leggja ein flogvøll í Vágum, sum danir síðani hava havt ræði á. Øll eru samd um, at teir í stóran mun hava misrøkt sína uppgávu sum eigarar. Úrslitið er, at vit liggja mitt í sjónum við einum sambandi, sum á ongan hátt er nøktandi í okkara tíð. Samgongan sum situr, sigst hava verið í samráðing um flogvallaviðurskiftini. Úrslitið er, at flogvøllurin er yvirtikin. Komin á føroyskar hendur. Hetta ljóðar flott, men sannleikin er, at danska stjórnin hevur kroyst eitt fyri føroyingar vitleyst konsept niður yvir akslarnar á løgmanni, Bjarna og Jørgen. Foghurin hevur trýst teir til at yvirtaka ein ikki dagførdan flogvøll, samstundis sum slakar 400 milliónir krónur skulu brúkast úr Íleggingargrunninum, sum hesir somu trællir hava avreitt dønum í eini fólkatingslóg. Samráðingarúrslitið er, at føroyingar skulu gjalda fyri danska misrøkt ígjøgnum hálva øld, samstundis sum Íleggingargrunnurin varð amputeraður. Taið málið um Vága Floghavn var fyri á tingi, tók Tjóðveldi undir við uppskotinum. Og meira enn tað. Í mun til eina flogvallabreyt í Vágum á 1600 metrar, mæltu vit bæði Heidi Petersen í vinnunevndini til, at táið farið varð undir hesa verkætlanina kortini, var rættast at gera mest optimalu loysnina í Vágum alt fyri eitt, sum er at leingja breytina til 1800 metrar. Táið Íleggingargrunnurin er foreraður burtur úr føroyskum eigaraskapi allíkavæl, mátti tað borið til at samrátt seg fram til bestu loysnina, sum kostar einar 135 milliónir meira enn hendan hálva loysnin hjá Jørgen og hansara fylgineytum. Okkara støða er skjalaføst í skjølum løgtingsins, og er ikki broytt. Heldur ikki um vanliga túnatosið hjá fólkafloksmonnum roynir at reingja hendan veruleikan. Smíðaðar søgur um hetta sama, hjá damum, sum á morgni ikki vita hvønn politiskan lit tær hava á kvøldi, sum vassa úr rekkjuváðini hjá sambandinum í fólkafloksins ditto í einum og sama sólarringi, kunnu heldur ikki brúkast til nakað sum helst. Og har man reka óluksáliga hart á kíkin, táið Svend Aage nú er einasti brimilin í látursmunnanum.

Í heyst vóru vit nakrir tingmenn, sum løgdu fram uppskot um, at farið verður undir at fyrireika ein altjóða flogvøll í Føroyum. Uppskotið varð samtykt. Ætlanin við uppskotinum er, at landsstýrismaðurin alt fyri eitt fer undir at fyrreika bygging av veruligum flogvølli í Føroyum. Ongin ivi er um, at hetta er tann einstaka íløgan, sum í stórstan mun kann flyta okkum úr blindtarmsstøðuni í alheiminum út í altjóða turbolensin. Táið vaktarskifti verður í Vinnumálaráðnum eftir valið, skal hetta málið setast ovast á breddan, og fáa ta seriøsu handfaring, sum so himinrópandi hevur væntað í hesum valskeiði. Í mun til hvat Djurholm og Niclasen halda, so snúgva føroysk flogvallaviðurskifti seg als ikki um lokalpolitikk í Vágum og í Havn, men um bestu og bíligastu atgongdina hjá fólki til og frá einum landi, sum hevur størri tørv á hesum enn tey flestu.

Sitandi samgonga hevur samanumtikið ikki loyst nakað mál. Danir hava sitið omaná teimum hagartil teir boygnaðu, og síðani lótu teir hesar somu tøma og yvirtaka restirnar av Íleggingargrunninum, fyri at dagføra danska misrøkt í Føroyum. Hetta hevur onki við politikk at gera, men er toppurin av kolonialari undirbrotligheit. Hinvegin, so er málið avgreitt frá tinginum, og fyri at bjarga tí sum frægast upp á turt, mæltu vit í Tjóðveldinum til, at alt tað sum gerast kundi í Vágum varð gjørt. M.a. at vøllurin varð longdur til 1800 metrar. Hendan tilráðingin er eitt faktum, sum ikki broytist av slatrinum hjá smáum monnum, sum trívast best í skugganum av føgrum eikitrøum. Og tað er eisini eitt faktum, at Jørgen og hansara fylgineytar í samgonguni ikki vildu vita av hesum uppskoti okkara. Ræðslan fyri donskum valdsharrum var ov stór til tess.

Útbyggingin í Vágum er farin í gongd og steðgast ikki. Hinvegin eigur hetta á ongan hátt at forða fyrireikingunum til ein veruligan altjóða flogvøll í Føroyum, líkamikið um hann verður lagdur í Nólsoy, á Skorðhæddini, á Glyvursnesi, í Svínoy ella í Vágum. Hetta snýr um bestu atkomuligheitina til og frá landinum í allari ókomnari tíð. Einfaldari fær tað valla verið. Tað ræður um at royna ørnaleið fjart frá matfuglameingi.

**www.dimma.fo/Bloggan/torbjorn.jacobsen**

# Høvuðsorsøkirnar til at eg havi valt at stilla upp til løgtingsvalið 2008



SUNNEVA MOHR
Javnaðarflokkurin
Lamba

Eg vil vera við til at fáa javnstøðu á tingi. Eri sannførd um, at eitt breiðari kynsbýti og eitt breiðari aldursbýti hevði gagnað føroyskum politikki.

Meti, at eg kann ávirka samfelagsgongdina tann rættan vegin við mínum hugsjónum.

**Økini ið hava mín serliga áhuga:**

**Barnsburðarfarloyvi**
Málið skal vera eitt ára farloyvi. Fyrsta tíðin er sera umráðandi fyri barnsins menning, tí er tað av stórum týdningi, at barsilsskipanin verður tillagað soleiðis, at foreldrini hava møguleika at verða so nógv um barnið sum tilber.

**Børn við serligum tørvi**
Hóast tilboðini til børn við serligum tørvi tey seinnu árini eru betri og fleiri, er tað tó langt eftir á mál. Eg vil virka fyri at bøta um hesi viðurskiftir soleiðis:

**Fleiri tilboð til tað einstaka barnið.**
Tillaga skúlan soleiðis, at hann eisini rúmar barninum við serligum tørvi.
- Menna starvsfólkið
- Umlættingartilboð til barnið og familjuna

**Stakir uppihaldarar**
Eg vil berjast fyri at tryggja støkum uppihaldarum og børnum teirra livilig kor. Umstøðurnar eru munandi betri í grannalondunum, tí er tað av stórum týdningi, at vit bøta um hesi viðurskifti soleiðis, at tey ungu heldur velja at verða búgvandi í Føroyum. Hetta gera vit við at:

**Veita dupultan lestrarstuðul**
- Veita barnaískoyti
- Gera tað lættari at leiga bústað ella at seta føtur undir egið borð.

**Gott val**

# Reinur slatur



NITA NÆS
Javnaðarflokkurin

Ein maður segði við meg, at hann hevði hoyrt, at eg eri ímóti Eftirskúlanum.

KANN MAN TAÐ?

Spurdi eg mannin.

Nei, tað visti hann ikki.

Tað er undarligt at fáa skotið nakað slíkt í skógvarnar.

Eftir mínari meting kann man ikki vera ímóti Eftirskúlanum í Hvalba.

Eg vóni at fólk reagera, tá vit siga ting um hvønnannan, sum heilt klárt er slatur.

Og eg vóni, at fólk eru so gløgg, at tey siga: Hatta kann ikki passa.

ONGIN KANN VERA ÍMÓTI EFTIRSKÚLANUM

MEN:

**Eg vil gjarna hava frítt orðaskiftið um avleiðingarnar at leggja ein skúla við 80 næmingum á ítróttarøkið mitt í Hvalba.**

Hvønn týdning og hvørja ávirkan fær tað fyri Hvalbiar bygd og tey ungu í Hvalba?

Hvønn týdning hevur tað fyri Eftirskúlan, at hann t.d liggur við síðuna av Roynhøllini, har dansur javnan er.

Sambart § 5, stk. 3, nr. 5 í løgtingslóg um byggi- og býarskipanir so skal kommunan vísa á eitt annað øki. Ætlar kommunan at gera tað?

EG VIL HAVA EITT FRÍTT ORÐASKIFTI OG TAÐ HARMAR MEG, AT TAÐ ERU FÓLK SUM VILJA LEGGJA LOK À EITT SLÍKT ORÐASKIFTI.

Minnast tit ikki, hvussu tað var við Hovstunnlinum? Um fólk við báðum beinum á jørðini ikki høvdu talað at í einum fríum orðaskifti, so hevði tunnilin ligið uppi í fjøllunum eins og Sandvíkstunnilin á sinni var lagdur.

LEINGI LIVI FRÍA ORÐASKIFTI!